## DAGSINS MEINING

# Fullan limaskap!

Danski mentamálaráðharrin, Brian Mikkelsen, hevur verið á fundi við Jacque Rogge, formann í altjóða Olympisku nevndini. Ørindini hjá Brian Mikkelsen vóru at kanna eftir, hvørt IOC á nakran hátt kundi loyva Grønlandi og Føroyum olympiskan limaskap. Hetta eftir stóru grønlendsku ónøgdina, nú grønlendskur skírennari ikki slapp við á danska OL-liðið, hóast hesin leyk kravtíðirnar hjá IOC. Orsøkin til tað er Brian Mikkelsen og ikki Jógvan á Lakjuni ella løgmaður, sum fer á slíkan fund, hava vit skilt er tann, at Brian skuldi á fund at tala við Rogge um ymisk mál eitt nú um søk grønlendinga. Jacque Rogge stóð fast við síni sjónarmið. Møguleikarnir fyri grønlendskum og føroyskum limaskapi eru lítlir, tí tað stendur í viðtøkunum, at einans lond, sum eru góðtikin av ST sum sjálvstøðug lond, kunnu gerast IOC-limir.

Hetta kemur ikki óvart á ÍSF, sum varðar at føroysku royndunum at fáa IOC-limaskap. Hasum vistu vit av. Lógirnar hjá IOC eru púrasta greiðar, og teimum verður ikki víkt frá. Hinvegin eru serstakar fortreytir tengdar at málinum. Hesar fortreytirnar eru tann sannroynd, at føroyska umsóknin varð send inn longu í 1984. IOC-lógirnar um, at talan skal verða um sjálvstøðug lond, vórðu broyttar í 1996, og tí metir ÍSF, at føroyska umsóknin skal viðgerast út frá øðrum fortreytum. Saman við Føroyum er Gibraltar einasta hjálandið, sum hevur líknandi umsókn inni. Gibraltar hevur nú stevnt IOC, tí teir bara hava »súltað« umsóknini av politiskum ávum, heldur enn at geva góðkenningina, sum teir meta seg eiga.

Støðan hjá ÍSF er púra røtt og vit kunnu bert mæla ÍSF til at halda fast við hesa støðu. Tá ið Føroyar hava søkt um limaskap í IOC, áðrenn reglurnar vóru tátaðar, so skal føroyska umsóknin sjálvsagt viðgerast eftir teimum reglum, ið tá vóru galdandi. Sum vit hava skilt er eitt annað land, Gibraltar, í somu støðu sum vit, og hevur Gibraltar sum nevnt lagt sak móti IOC. Dómurin í hesum máli er avgerandi fyri okkara søk. Vinnur Gibraltar, so fáa vit eins og Gibraltar fullan limaskap. Tapir Gibraltar, hava vit ein stróran trupulleika, tí so er enn einaferð prógvað, at okkara statsrættarliga støða er ein forðing fyri okkara luttøku í altjóða samstarvi á ávísum øki. Vit hava eitt annað mál, i líkist hesum nevniliga spurningurin um fullan limaskap í Norðurlandaráðnum. Hetta mál byrjaði so gott fyri einum ári síðan, men so byrjaði gruggið at koma upp, og síðan er ikki eitt kis hoyrt um hetta mál, og eingin veit, hvar tað í løtuni liggur. Men ÍSF eigur at halda á við sínum stríði, og ÍSF eigur sjálvandi at fáa sær diplomatiska hjálp og stuðul frá løgmanni og landsstýrismanninum í ítróttamálum. Ítróttur er yvirtikið mál og tí nyttar lítið at dúva uppá danskar ráðharrar í einum slíkum máli.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Landsstýrismenn á skeivari kós

JÓHAN CHRISTIANSEN
Leirvík

**Nógv undarligt skal ein hoyra millum ár og dag. Nú hava tveir landsstýrismenn úttalað seg í fjølmiðlunum um, at besta loysnin í Leirvík kann skapa eitt skaðiligt fordømi fyri restina av landinum, skrivar Jóhan Christiansen**

Við yvirskriftini: *Leirvíksmálið er ein bumba undir framtíðar samferðsluætlanum.* Leggur landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm fyri. Millum annað sigur hann í greinini: *... Ein annar stórur trupulleiki við at góðtaka tunnilsverkætlanina sum hon fyriliggur, er at hetta skapar presedens...(D immalætting 14 feb.)*

Síðani vil annar landsstýrismaður sleppa í part, nevnuliga Bárður Nielsen, við útsøgnum sum: *Hann heldur, at um leirvíkingar fáa veg við lokrennu á sløttum, sum í minsta lagi verður tvífalt so dýrt sum ein vegaloysn oman fyri bygdina, kunnu vit vænta, at trýstið aðrastaðni fer at veksa. – Nógvastaðni kring landið er nógv ferðsla, og tað er ikki allastaðni, at vegirnir eru útbygdir samsvarandi ferðsluni...*

(*www.olivant.fo* *20. feb.*)

Tað hesir fólkavaldu politikkara siga er, at leirvíkingar mugu ikki fáa tí **bestu** farleiðina, tí vandi er fyri at onnur so fara at seta somu krøv.

Bárður Nielsen sigur enntá... *– Nógvastaðni kring landið er nógv ferðsla, og tað er ikki allastaðni, at vegirnir er útbygdir samsvarandi ferðsluni.*

Boðskapurin hjá Bárði Nielsen er við hesi útsøgn: *Vit mugu ikki gera eina góða farleið um Leirvík, tí so vera vit noydd at gera ábøtur á verandi vegakerv, so vegirnir vera útbygdir samsvarandi ferðsluni.*

Er málið, at besta farleiðin um Leirvík ikki skal vinna fram sum eitt presedens/fordømið, tí so sleppa landsmyndugleikanir frá at koma við góðum loysnum aðrastaðni í landinum, eitt nú t.d í Klaksvík .?

Mínir spurningar eru tískil:

1. Hvat er galið við góðum farleiðnum?
2. Hví skulu ábøtur ikki gerast á verandi vegakerv, har tørvur er á tí?

Aðalmálið hjá einum og hvørjum sum bjóðar seg fram at stjørna einum landið, skal vera at finna bestu loysnirnar uppá øll mál. **Altíð at skapa góð fordømir**, og ikki at leggja meinbogar í vegin fyri góðum loysnum, fyri løtuvinningar.

Eg vil hervið heita á allar landspolitikkara at seta nýggja kós. Eina kós sum tænir øllum samfelagnum. Eina kós, sum røkkur longur enn bert eitt valskeið í senn.

# Lýsið tað betur tá Norröna skal í dokk

KENNETH B. OLSEN

**– Um Norrøna skal í dokk, um tað er á sumri ella vetri, so lýsið hetta í góðari tíð. Tað eru ikki tit, sum sita eftir við grátandi børnum, tí tey ikki sleppa í konfirmatión hjá systkinabørnum í Danmark, eru ráðini frá Kenneth B. Olsen til leiðsluna á Smyril Line**

Fyrigevið okkum, katalogið er als ikki eftirfarandi, hetta er yvurskriftin á síðu 2 í tí nýggja kataloginum hjá Smyril Line.

Hetta máttu eg og familjan ásanna. Eg og míni nærmastu skuldu niður til Danmarkar í konfirmatión tann 25. mai 2006, so hugdi vit í katalogið hjá Smyril Line, har kundi vit koma niður til Dk. fyri bert 6770 kr. Vit at bíleggja summarhús frá Dansommer, síðani ferseðil frá Smyril Line til tann 18. mai 2006, NÙ VÓRU VIT ØLL GLAÐ.

MEN so ringdi Smyril Line. Norrøna skal í dokk, tit kunnu ikki fara niður til Danmarkar tann 18. mai 2006. SJOKK.

Um Smyril Line skal meta seg sum eitt felag, ið bjóðar øllum at pakka bilin í túninum og koyra umborð, so skulu tit lýsa í góðari tíð við, at Norrøna skal í dokk tann 13. til 20. mai.

Nú kunnu vit ikki koma til Danmarkar fyri bert 6770 kr. tann 18-05-06, sum er lýst í tí nýggja kataloginum hjá Smyril Line.

Um Norrøna skal í dokk, summarfrí ella vetrafrí, so lýs hetta í góðari tíð.

Tí tað eru ikki tit sum sita eftir við grátandi børnum, ið ikki sleppa í konfirmatión hjá systknabarninum í Danmark tann 18-05-206 fyri bert 6770 kr við bili, sum lýst var í nýggja kataloginum hjá SMYRIL –LINE.




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.